# Stríðast alla tíðina

**Hóast tað til tíðir sá spælandi lætt út hjá VÍF, so var Sóleyð Mikkelsen eftir dystin sannførd um, at tað var neyðugt at stríðast frá byrjan til enda móti VB**

STEYPAFINALA
*Jákup Mørk*

Liðskiparin hjá VÍF, Sóley Mikkelsen, var kanska fram um hinar leikararna leygardagin í eini serstøðu.

Meðan hon leikti við StÍF, hevur hon nevnliga verið í finaludysti móti bæði VB og VÍF, men sambært liðskiparanum sjálvari, so var hetta ikki nakað, sum hon hugsaði um, áðrenn hon fór á vøllin.

– Eg vil ikki siga, at tað var nakað, sum ávirkaði meg nakað serligt. Ikki annað enn tað, at vit taptu fyri tveimum árum síðani móti VÍF, og tað var so avgjørt ikki nakað, sum eg ætlaði mær at royna eina ferð afturat.

– At tapa ein finaludyst, er snøgt sagt ov tungt at bera. Tað royndi eg tað ferðina, og eg hevði sett mær fyri, at tað so avgjørt ikki var nakað, sum skuldi henda aftur. Tá er tað nakað stuttligari at standa sum vinnari eftir dystin.

## Liðavrik

Spurd, um tað var nøkur serlig orsøk til, at VÍF í dag gjørdist steypavinnari, segði Sóley, at talan fyrst og fremst var um eitt liðavrik.

– Vit vóru undan dystinum fullgreiðar um, at skuldi vit vinna, so kravdi tað, at vit stríddust alla tíðina. VB fer altíð á vøllin við hugburðinum um, at tær vilja stríðast til tað allar seinasta, og tí vistu vit av, at kravið var ein rimmar innsatsir, um vit skuldu gera okkum vón um at vinna.

Sum kunnugt eydnaðist hetta, og mong munnu vera av teirri fatan, at VÍF nú hevur beina kós móti greipuni.

Tað er so í øllum førum nakað, sum vit fara eftir, sigur ein fegin Sóley Mikkelsen at enda.



*Eftir dystin kundi Sóley saman við venjaranum fegnast um steypið, sum ætlandi verður tað fyrsta av tveimum hetta kappingarárið*

S K E I Ð F Y R I V I N N U L Í V I Ð

INNLIT Í KOLVETNISÍDNAÐIN

MDT INTERNATIONAL

FYRILESTRAHALDARAR




BA, ACIS, stovnari av MDT International, sum veitir oljuvinnuni serskeið og upplæring um allan heim. Fyrrverandi fíggjarleiðari í British Leyland, British Gas Corporation og Conoco




BSc, PhD. Hevur arbeitt hjá Royal Dutch Shell kring heimin sum leiðari á høgum stigi innan kolvetnisverkfrøði. Hevur umfatandi royndir í praktiskum og fíggjarligum avgerðum á leiðslustigi.

www • team85 • fo

**Hósdag og fríggjadag, 8. - 9. mars 2001 kl. 9.00-17.00**

Hetta skeið er ætlað leiðarum og starvsfólki á virkjum, sum kunnu hava fyrimun av eini nágreiniligari fatan av kolvetnisleiting, boring og útvinning.
Skeiðið, ið verður hildið á enskum í skeiðshølunum hjá Føroya Sparikassa, varar í tveir dagar.
Tá skeiðið er liðugt, skilja luttakararnir betur

- upprunan til kolvetni
- kolvetnisleiting
- myndugleikar og kolvetnisleiting
- boring eftir olju og gassi
- kolvetnisframleiðslu
- ráoljureinsing
- mál og málnýtslu í kolvetnisvinnuni

Luttakaratalið á skeiðnum er avmarkað til 30.
Kostnaðurin er 6.250,00 kr. íroknað tilfar og mat báðar dagarnar.

Fleiri upplýsingar fáast á heimasíðunum hjá Reveal International, www.reveal.fo, og Føroya Sparikassa, www.sparikassin.fo.

Bindandi tilmelding fer fram hjá Føroya Sparikassa, Julionnu Holm Jacobsen, tel 348000.
Luttøkugjaldið verður at flyta til Innlit á konto nr. 9181 132.272.0 í Føroya Sparikassa

innlit
SKEIÐ • FYRI • VINNULÍVIÐ

INNLIT, sum er eitt samstarv millum Føroya Sparikassa og Reveal International, skipar fyri skeiðum á høgum stigi fyri vinnulívið.

# Fyrireikaðu seg væl

**Fríða Marjunardóttir helt eftir dystin, at størsta einstaka orsøkin til sigurin var, at VÍF genturnar høvdu nýtt nógva tíð at fyrireika seg til dystin**

STEYPAFINALA
*Jákup Mørk*

Ein av leikarunum, sum veruliga hevur gjørt um seg á kvinnuliðnum hjá VÍF hetta kappingarárið, er ungi miðspælarin, Fríða Marjunardóttir.

Leygardagurin var í so máta einki undantak. Sum tað mest nátúrliga av øllum stýrdi hon álopsspælinum hjá VÍF, og í verjupartinum gjørdi hon fulla nýtslu av hvørjum einasta sentimetri í kroppinum, so mótstøðuliðið ikki skuldi fáa ov lætt spæl.

Soleiðis sum hon spældi, skuldi ein als ikki hildið, at týdningurin av dystinum var nakað, sum nervaði hana, men hon viðgekk tó eftir dystin, at spenningurin í hópinum hevði verið øgiligur undan dystinum.

– Sjálvandi vóru vit spentar, og at byrja við haldi eg eisini, at spælið hjá okkum var eitt sindur rótut, men tá vit so fingu nøkur mál, kom líka sum meira friður yvir spælið. Vit fara so eitt sindur niður aftur í ferð - eg veit ikki hví – men tíbetur megnaðu vit kortini at halda fast allan dystin á tamb.

## Væl fyrireikaðar

Fríða heldur annars, at ein av orsøkunum til góða úrslitið í finaluni var, at tær vóru sera væl fyrireikaðar til dystin.

– Vit hava seinastu tíðina roynt at verið sera nógv saman, og vit hava eisini hugt eftir upptøkunum frá hinum dystunum, sum vit hava spælt móti VB. Tosað nógv um, hvat hvør einstøk skuldi gera undir dystinum, og alt hetta haldi eg var størsta orsøkin til, at alt eydnaðist somikið væl hjá okkum í dag.



*At smílið var stórt eftir dystin, var einki at siga til. Saman við liðfeløgunum kann Fríða rópa seg steypavinnara 2001*



Vinnarar av Coca-Cola Kappingini



VÍF - vinnari av Coca-Cola Kappingini hjá kvinnum



StÍF - vinnari av Coca-Cola Kappingini hjá monnum

Coca-Cola ynskir kvinnunum hjá VÍF og monnunum hjá Stíf hjartaliga tillukku við steypunum

PH
P/F POUL HANSEN

Coca-Cola Kappingin í Hondbólti

Coca-Cola stuðlar hondbóltinum!